# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jóhan Petersen, Norðdepli**, búsitandi í Gudme í Danmark, andaðist leygardagin, 88 ára gamal. Jarðarferðin verður úr baptistkirkjuni í Oure, Albjergvej 4, fríggjadagin klokkan 12. Tey, ið vilja minnast Jóhann kunnu lata eina gávu á konto í Eika banka.

**Hans Petur Brekkstein**, bóndi, Velbastaður, andaðist týsdagin, 82 ára gamal.

**Petra Samuelsen, Tórshavn** andaðist á Landssjúkahúsinum sunnudagin, 97 ára gomul. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Dómkirkjuni hósdagin kl. 14.

†

Okkara kæra mamma, omma, systir, fastir og svigarinna

**Elsa úr Konoy**

dóttir Gunnhild og Albert Jakobsen
ættað úr Gøtu

andaðist 19. mars, 64 ára gomul.
Jarðarferðin verður leygardagin 28. mars kl. 13 frá Sundby Krematoriums Kapel, Kastrupvej 51, 2300 København S.

**Nanna og Sebastian**
**Mortan og Jákup Pauli**
**Niklas, Peter, Anna, Signe og Christina**
**Eva og Susanne**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at høgt elskaða mamma, omma, langomma og vermóðir okkara

**Petra Samuelsen**

andaðist 22. mars, 97 ára gomul.

Bønarhald verður í kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikudagin kl. 18.

Gravarferðin verður hósdagin 26. mars kl. 14 úr Dómkirkjuni.

*Vegna tey avvarðandi*
**Hjørdis, Elsuba, Sigrun og Heðin**

# Archibald Black í Focus




Fríggjadagin 27. mars kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá listamanninum Archibald Black upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn. Undir ferniseringini syngur Hanus G. Johansen.

Gunnar Nolsøe skrivar m.a. soleiðis um Archibald Black og framsýning hansara: Jethro Tull, Paul Rodgers og Straight Ahead eru tónabornir felagsnevnarar, tá hugsað verður um listarmannin Archibald Biskupsstøð Black, ið er føddur 30. januar 1956, búsitandi í Klaksvík, og útbúgvin bygningssnikkari og autodidaktur listarmálari.

Archi hevur málað heilt síðani á ungum árum, eins og hann, síðani 1994, hevur undirvíst í málningalist í Kvøldskúlanum í Klaksvík.

Í málningum sínum lýsir Archi eitt nú, á ein ofta hugtakandi og huldusligan hátt, føroysku náttúruna, eins og hann við sínum sermerktu portrettum, har myndaevni ofta eru eldri menn, og har hvør andlitsfura sigur sína søgu um eitt langt og hendingarríkt lív.

Á framsýningini í Galerie Focus verður temaevnið myndir frá Dreymsóljuni, altso, myndir málaðar í umhvørvinum við hugnaligu fjallasmáttuna, har avbjóðingarnar serliga eru sníkjandi mjørkin og sermerkta ljósið.

Framsýningin verður opin til 8. apríl, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.

**Brúdleyp**
8. apríl giftast í Keypmannahavn Stine Dobak Jensen, Oslo, og Tummas Planck Reinert, Tórshavn. Adressan er Øresundsvej 92, 2 th., 2300 København S.

**Brúdleyp**
Flaggdagin 25. apríl giftast Annika Soll, Sørvágur, og Sámal Kristian Jacobsen, Tórshavn. Vígslan verður í Havnar kirkju kl. 14.00 og veitsla fyri innbodnum verður í Eydnuni á Oyrarbakka kl. 19.00.

**Brúdleyp**
Leygardagin 9. mai 2009 giftast Marna Kristiansdóttir, Saltnes og Kaj Ennigarð, Syðrugøta. Vígslan verður í Nebo á Toftum kl. 13.00 og veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00
Tey sum ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga okkum frá áðrenn 26. apríl á tlf. 258913 / 448319 (Marna) ella 593905 / 441523 (Kaj).



**Dagurin**
**25. mars. Mariumessa um várið.** Til minnis um, at eingilin Gabriel boðaði Mariu Moy frá, at hon skuldi bera frelsaran í heim (Lukas 1, 26-38). Grikska navnið navnið Maria er tað sama sum hebráiska Mirjam, týdningurin er ókendur. Hoyrdist mýrisnípan láta uppi í luftini á mariumessu, skuldi kavi koma, og tað sama um ross lá fyri mariumessu. Venceslaus Ulricus Hammershaimb (Vensil próstur) varð føddur á Steig í Sandavági hendan dagin í 1819.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# 190 ár síðani V. U. Hammershaimb varð føddur



*V. U. Hammershaimb, sum endurskapti okkum skriftmálið, varð føddur á mariumessu, 25. mars í 1819*

25. mars í 1819 varð Venseslaus Ulricus Hammershaimb føddur á løgmansgarðinum á Steig í Sandavági. Pápi Vensils, Jørgen Frants Hammershaimb var seinasti løgmaður áðrenn løgmansembætið varð niðurlagt í 1816.

Jørgen Frants doyði, tá Vensil var ársgamal, og mamman, Armgard Maria f. Egholm, flutti tá til Havnar og inn til móður sína í Nýggjustovu.

Vensil vaks upp í Gongini, higani bæði foreldrini vóru ættað. Mammman úr Nýggjustovu og pápin úr Fútastovu, hann var sonur gamla fútan, sum eisini æt V. U. Hammershaimb.

V. U. Hammershaimb er kendur sum hann, ið skapti okkum skriftmálið – eitt nú er tað av hansara ávum, at vit hava bókstavin ð í okkara skriftmálið. Hann mælti til, at vit tóku tað etymologisku stavsetingina, heldur enn tað fonetisku. Munurin er, at við teirri etymologisku fara vit aftur til frummálið, meðan vit við teirri fonetisku stavsetingini stava orðini soleiðis, sum tey verða framborin. Tað var hesa stavseting, eitt nú Dr. Jacobsen mælti til at brúka.

V. U. Hammershaimb hevur skrivað, at hann sum smádrongur var sera hugtikin av eini gamlari konu, Birta á Kletti, sum javnan kom í Nýggjustovu og segði børnunum frá søgum. Hann er eisini ávirkaður av ommubeiggjanum, Jens Christian Svabo, sum búði í grannahúsunum, og sum doyði í 1824 tá Vensil var fimm ára gamal.

Vensil gjørdist prestur og Føroya próstur. Hann flutti á ellisárum til Danmarkar at búgva, men vitjaði aftur á síðsta sinni í 1893. Hann doyði í Keypmannahavn 8. apríl í 1909, 90 ára gamal.